Suðuroyartunnilin

Miðnámsskúlin í Suðuroy // 4. september 2017

Armgarð E. Steinhólm, deildarleiðari, deildin fyri Infrakervi

Fríðrik Heinesen, sivilverkfrøðingur, deildin fyri Infrakervi

LANDSVERK

Innihald

- Samferðsluætlanir
- Beinleiðis tunnil
- Tunnil umvegis Skúgvoy
- Tunnilsmunnar og avleiddar verkætlanir
- Jarðfrøði / Trygd
- Kostnaður
- Nøkur fakta

LANDSVERK

Samferðsluætlanir

- Landsverk hevur gjørt tvær samferðsluætlanir, har vit lýsa útbyggingarætlanirnar í landinum.
  - *2008-2020*
  - *2012-2024*

- Í 2008-2020 verður mælt til havn á Sandi og Hvalba fyri at betra um títtleikan á Suðuroyarleiðini, umframt at mælt verður til forkanningar viðv. Suðuroyar-tunlinum.

- Í 2012-2024 verða tekningar av Suðuroyartunlinum fyrstu ferð vístar. Farleiðin millum Sandvík og Trongisvág verður eisini raðfest.



LANDSVERK

Søguligt samband til Suðuroy

- Smyril 1 var bygdur í 1890´inum, og hann var tann fyrsti av 5 Smyrlum, ið hava røkt farleiðina til Suðuroyar.

- Núverandi Smyril byrjaði at sigla millum Tórshavn og Tvøroyri 15. oktober 2005. Hann hevur eina metta livitíð á umleið 30 ár.

- Ferjulegan Krambatangi var liðug í 2004. Hon var gjørd til at klára tann nýggja Smyril.



LANDSVERK

Søguligt samband til Suðuroy

- Samferðsluútbygging-arnar hava gjørt, at ferðatíðirnar í landinum eru styttar munandi seinastu 60 árini.
- Málið er, at ferðatíðin til og úr Tórshavn ikki skal verða longri enn 1 tíma.
- Suðuroyartunnilin vil stytta hesa ferðatíðina niður til umleið 1 tíma.



LANDSVERK

Pendlan

- Pendlarar eru fólk, ið ferðast millum heim og arbeiði.
- Samferðsluútbyggingar geva betri møguleikar at búgva longri burtur frá arbeiðsplássinum.
- Suðuroyartunnilin vil tí geva møguleika at ferðast millum Suðuroynna og miðstaðarøkið til arbeiðis.
- Pendlarakanning frá 2010



LANDSVERK

Beinleiðis tunnil

- Ein beinleiðis tunnil millum Sandoynna og Suðuroynna vil verða rættiliga langur.

- Frá eystanbygdunum á Sandoynni kann hann styttast nakað, men tá skal nógv vegakervi dagførast á Sandoynni.

- Størsta avbjóðingin við einum so langum tunli vil verða trygdin, har tað er ringt at síggja burtur frá t.d. royki í sambandi við eld.



LANDSVERK

Skúgvoy

- Landsverk hevur arbeitt við eini loysn at stytta tunnilin við at lata hann koma upp á Skúgvoynni.
- Tað vil geva okkum nakrar avbjóðingar við, hvar tunnilin liggur best á oynni.
- Ferðslumynstrið á oynni vil eisini broytast nógv, um ferðslan frá tunlinum skal koyra gjøgnum oynna.

LANDSVERK

Linjuføring

- Ein møgulig linjuføring kann síggja soleiðis út.
- Her fáa vit tveir tunlar, ið hvør er styttri enn ein beinleiðis tunnil, men tilsamans verða tað fleiri kilometrar av tunli enn ein beinleiðis tunnil.
- Við eini tílíkari loysn, kunnu vit seta trygdarkrøv til hvønn tunnil sær, ið vil gera tað samlað bíligari enn ein longri tunnil vil verða.

LANDSVERK

Linjuføring



LANDSVERK

Tvørskurður

- Tvørskurðurin verður sum á Eysturoyartunlinum.
- Breidd 10,5 m.
- Vegbreidd 2x3,5 m.
- Miðøki 1 m.
- Hædd 4,6 m.



LANDSVERK

Munnin á Sandoynni

- Tunnilin kann fara inn, har smiðjan hjá Landsverki er, umleið 3 km frá Sandoyartunlinum.

- Brekkan niður í tunnilin er 40‰. Um vit gera hana 50‰, kann tunnilin styttast við 400 metrum.

- Tað verður tó ringt at finna eitt passandi inntak tættari sjónum uttan at koma inn í bygdina.

LANDSVERK

Munnin á Skúgvoynni

- Tunnilin av Sandoynni kemur upp norðanfyri, og Suðuroyartunnilin fer inn suðureftir.
- Kirkjugarðurin liggur beint við sunnara tunnilsmunnan.
- Sunnan fyri bygdina er helst tað besta plássið til tveir tílíkar munnar við 300-400 metra millumrúmi.
- Íbinding kann gerast til bygdina, men kjakast má um, hvussu atkoman skal verða

LANDSVERK

Munnin í Sandvík

- Við at koma upp í Sandvík stytta vit tunnilin umleið 3 km.
- Vit kunnu leggja tunlarnar so mikið langt frá sjálvari bygdini, at teir ikki ávirka bygdina.
- Hetta førir við sær ein nýggjan Sandvíkartunnil.



LANDSVERK

Hvalba

- Í Hvalba er ætlanin at gera umfarsveg, so høvuðsferðlan verður leidd uttan um bygdina.
- Umleið 4 km verður hesin vegur, men partar av honum eru longu við í verkætlanini til nýggjan Hvalbiartunnil.
- Útbyggingar í Hvalba mugu taka hædd fyri hesum vegnum.

LANDSVERK

Hvalbiartunnil

- Tunnilin verður prosjekteraður í løtuni.
- Er mettur til umleið 260 mió kr.
- Í løtuni sær út til, at hann verður raðfestur politiskt at verða gjørdur frá 2019



Jarðfrøði

- Landsverk og Jarðfeingi mæla til, at jarðfrøðin verður kannað nærri, har ætlanin er at leggja tunnilin.

- Sær tó út til, at tunnilin fyri tað mesta fer at liggja í Miðfláunum.

- Uppskot til jarðfrøðiliga játtan:
  - *1 ár: 550.000 kr.*
  - *2 ár: 1.200.000 kr.*
  - *3. ár: 2.000.000 kr.*



LANDSVERK

Trygd

- Trygdin er ein avbjóðing í langum tunlum.
- Tunlarnir eru longri enn teir vanligu trygdarnormarnir, vit brúka.
- Landsverk mælir tí til, at ein trygdarkanning verður gjørd skjótt fyri at fastleggja tað neyðuga trygdarstøðið.
  - *Rýmingartunnil*
  - *2-rør tunnil*
  - *Rýmingarrúm*
- Uml. 1-2 mió kr.



LANDSVERK

Kostnaður

- Kostnaðurin av tunlinum veldst um, hørjar loysnir vit velja, og hvat trygdarstøði vit góðtaka til tunnilin.

- T.d. vil ein rýmingartunnil ella ein 2-rør tunnil dýrka munandi um verkætlanina.

- Um vit velja loysnina umvegis Skúgvoynna, so kundu vit valt trygdarstøðið og vegleiðandi prísmetingar til Eysturoyar-tunnilin sum dømi at prísmeta tunnilin.

LANDSVERK

Kostnaður

- Hesar fortreytir geva okkum eina prísmeting á 3,1 mia kr. fyri tunnilin.
- Hetta eigur at verða sett upp ímóti einum kostnaði at keypa og reka nýtt skip um nøkur ár.



(Tekur bert hædd fyri útveganarkostnaði, rakstri og viðlíkahaldi. T.v.s. ikki kost-nyttu kanning)

LANDSVERK

Kostnaður

- Avleiddar verkætlanir, men fleiri er tørvur á, líka mikið um vit gera tunnil ella ikki:

Verkætlan	Longd (km)	Kostnaður (mió)
Suðuroyartunnil	9+17	3.100
Sandvíkartunnil	2,5	200
Vegur Sandvík	0,6	10
Vegur Hvalba	2,5	40
Vegir Sandoy	3	15
Hvalbiartunnil	2,5	260

LANDSVERK

Nøgdir

- Tilfarið, sum kemur úr hesum báðum tunlunum, er umleið 3.100.000 m^3, tá ið tað er útlagt aftur.

- Um tað lá á einum fótbóltsvølli, hevði tað verið umleið 600 m høgt.

- Um vit fyltu tað í vánna í Vági, so hevði tað fylt vánna út til Pálshøll, og Føroyar høvdu blivið 0,025 % størri.



LANDSVERK

Longdir

- Við Suðuroyartunlinum verður fast vegasamband millum 99% av øllum føroyingum.

- Vit høvdu verið noydd at broytt hetta skeltið:

LANDSVERK

Kunning

- Í kvøld er eitt tíðindaskriv á heimasíðuni hjá Landsverki frá fundinum.

- Viðheft tíðindaskrivinum er notatið um Suðuroyartunnil og henda framløga.

LANDSVERK

Takk fyri okkum!

Óli Petersen 2012